## Skótahjálpin í Sandoynni fekk 6.800 krónur



Seinastu vikuna hava skótar úr eystanbygdunum í Sandoynni gingið hús úr húsi, at bjóða fólki sína arbeiðsmegi. Gjøgnum skótahjálpina stuðla og hjálpa frísk og ferðug børn illa støddum børnum, úti í heimi og heima í Føroyum. 13 skótar hava tikið lut, og hava tey í alt fingið 6.800 krónur. Í ár stuðlar skótahjálpin einum gentubarnaheimi í Tansania í vestur Afrika, og í Føroyum verður stuðul latin til børn hjá sálarliga sjúkum, sum hava tørv á tí. Ætlanin er at framleiða tilfar til bæði børnini og foreldrini umframt at seta á stovn samrøðubólkar til børn hjá sálarsjúkum. KFUK-skótarnir, sum eru um 20 í tali, hittast í missiónshúsinum í Skálavík eina ferð um vikuna.

## Demokratia rósar Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum

Demokratia fegnast um javnstøðustigini hjá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Fólkaflokkurin hevur fyri fyrstu ferð valt eina kvinnu í landsstýrið. Javnaðarflokkurin hevur aftur hesa ferð hildið sítt lyfti um javnstøðu í landsstýrinum. Hetta er fyrsta ferð í søguni, at allir samgonguflokkar eru umboðaðir av báðum kynunum í landsstýrinum. - Stórt tillukku frá Demokratia, verður sagt í tíðindaskrivi.

# Bukaður sundur og saman tríggjar ferðir somu nátt

**Eina náttina herfyri kom ein ungur drongur rættiliga illa fyri, tá ið eitt harkalið av ungum dreingjum og gentum forfylgdu honum ígjøgnum náttarlívið í Havn og bukaðu hann sundur og saman heilar tríggjar ferðir hesa somu náttina**

HARÐSKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Ein ungur maður í Havnini kom verri fyri enn hann hevði droymt um, tá ið hann fór í býin í Havnini eitt kvøldið herfyri.

Tað endaði við, at hann var bukaður sundur og saman – ikki bara einaferð, men heilar tríggjar ferðir hesa somu náttina.

Men tað helt merkisverda við hesum málinum var, at tað vóru somu fólkini, sum løgdu á hann allar tríggjar ferðirnar.

Tað var eitt harkalið av tveimum ungum gentum og einum ungum dreingi, sum forfylgdu honum ígjøgnum náttarlívið í Havnini og løgdu á hann heilar tríggjar ferðir og hagreiddu hann so illa, at hann endaði á Landssjúkrahúsinum.

Hann var bæði sligin fleiri ferðir við knýttum nevum og eisini sparkaður aftaná, tá ið hann var fallin í vegin, stendur í ákæruritinum.

Fyrstu ferð, hann var álopin, vóru tey øll trý í felag, tá ið tey løgdu á hann og slóu og sparkaðu hann fleiri ferðir.

Aðru ferðina vóru genturnar einsamallar tá ið tær løgdu á hann og góvu honum ein rættiligan umgang, eitt nú við at buka hann í høvdið við stivlunum

Triðju ferðirnar hann varð álopin, vóru tey aftur øll trý saman, tá ið tey bukaðu hann av.

Tað var ein góð løta ímillum allar tríggjar hendingarnar og tær fóru fram ymsastaðni í býnum.

Maðurin fór so illa av viðferðini hann fekk, at hann endaði á Landssjúkrahúsinum við skurðum og merkjum ymsastaðni.

Tey trý álopsfólkini eru nú ákærd fyri harðskap av serliga ráðum og vandamiklum slagi.

Av tí at málið skal til viðgerðar í rættinum, er tað avmarkað, hvat kann upplýsast um tað.

Tey trý álopsfólkini siga, at ein orsøk var til, at tey vóru so ill við mannin, tey lupu á, men tað ber ikki til at fáa tað upplýst enn.

# Tikin fýra ferðir við ongum koyrikorti

**Tað fer at ganga rúm tíð, áðrenn ein ungur drongur kann droyma um at fáa koyrikortið aftur**

KOYRING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey næstu nógvu árini verður tað nokk frægari hjá einum ungum manni at seta pening av til góðar gangiskógvar, heldur enn til koyrikort.

Hann skal nevniliga ikki vænta sær at fáa koyrikortið aftur tey fyrstu árini.

Tað er nakað síðani, at hann misti koyrikortið.

Men síðani er hann tikin heilar fýra ferðir fyri at koyra bil við ongum koyrikorti.

Einar tvær ferðir hevði hann harafturat drukkið so mikið nógv, at hann eisini er ákærdur fyri rúsdrekkakoyring í hesum báðu førunum.

Tvær ferðir endaði biltúrarnir eisini við ferðsluóhappum við stórum materiellum skaðum, men ongum fólkaskaða.

Tað einu ferðini høvdu hann og nakrir vinmenn stolið ein bil við Norðurlandahúsið í Havn og koyrt heilt vestur í Vágar.

Lyklarnir stóðu í bilinum, men tá ið teir skuldu fara avstað við honum, rendu teir á. Teir krógvaðu seg so eina løtu, men tá ið teir vóru vísir í, at ongin hevði meldað óhappið og at løgreglan tískil ikki kom, fóru teir avstað við bilinum.

Teir koyrdu heilt vestur í Vágar, men har krassjaðu teir bilin einaferð afturat.

Eina aðru ferð, teir høvdu ballast, hevði hann eisini sett seg við rattið. Tann túrurin endaði við, at hann rendi á tvey skelti og á oynna mitt á Marknagilsvegnum. Har varð bilurin standandi fastur, men teir rýmdu av staðnum, uttan at siga frá.

Maðurin skyldaði upp á, at bilurin hevði verið punkteraður og at eykahjólið bara var eitt av hesum lítlu, óbrúkiligu neyðhjólunum, sum ikki lá so væl á vegnum. Tí hevði hann forroknað seg so at hann misti tamarhaldið á bilinum og rendi á.

Triðju ferð, hann varð tikin, høvdu teir verið ballingartúr á bygd og tann, sum upprunaliga koyrdi bilin varð blivin fullur og vildi ikki koyra meir. Tí tók hesum yvir, hóast hann eisini var fullur.

Síðani varð hann tikin einaferð afturat við ongum koyrikortið.

Málið skal nú til viðgerar í Føroya Rætti og har kann hann vænta, at fleiri ár fara at ganga, til hann kann hugsa um at fáa koyrikortið aftur.

Maðurin játtaði seg sekan í øllum.

## Suðuroyingar tosa um kommunusamanlegging

**Mikukvøldið verður almennur fundur í VB-Húsinum í Vági um at leggja kommunur í Suðuroy saman**

KOMMUNUSAMAN-LEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Víða hvar í landinum verður nú tosað um at leggja kommunur saman og nú verður hesin spurningur eisini tikin upp í Suðuroynni einaferð enn.

Tað er kvinnufelagið í Suðuroy, ið nevnist Valkyrjurnar, sum hesuferð seta málið á dagsskrá í Suðuroy.

Tað gera tær við at kalla saman til almennan fund í VB-húsinum í Vági nú mikukvøldið klokkan 19.

Har fara borgarstjórarnir í teimum báðum høvuðskommununum í Suðuroy, Kirstin Strøm Bech í Vági og Kristin Michelsen á Tvøroyri, at siga sína hugsan um kommunusamanlegging í Suðuroy.

Men somuleiðis fer Rodmundur Nielsen, sum hevur verið borgarstjóri í Runavík, at siga sína meining um at leggja kommunur saman.

Tað var hann, sum var ein av undangongumonnunum at leggja kommunurnar rundan um Skálafjørðin saman og hann fer helst at greiða frá, hvørjar royndir tey hava av teirri samanleggingini.

Liggur tað fyri, verður eisini okkurt umboð úr landsstýrinum við á fundinum.

- Sum skilst, ætlar nýggja samgongan, at Føroyar skulu skipast í sjey stórar kommunur, longu í hesum valskeiðnum. Tí er tað av alstórum týdningi at spurningurin eisini verður tikin upp Suðuroy, so vit ikki enda í eini støðu, har vit verða tvingað til onkra loysn, siga Valkyrjurnar í Suðuroy